


www.oljan.fo

**Jan Müller** 12 - 02 - 2013

# Kina trýstir oljuprísin upp

Øktur eftirspurningur úr Kina og nýggjur spenningur um nakrar umstríddar oyggjar í Fjareystri hava trýst oljuprísin upp um 120 dollarar fyri tunnuna, og so dýr hevur oljan ikki verið síðani í apríl í fjør. Greinarar siga, at heldur príshækkingin fram, fer tað at noyða Saudiarabia at økja sína framleiðslu seinni í hesum mánaðinum. Í síðstu viku hækkaði prísurin á ráolju úr norskum og bretskum øki meiri enn tveir dollarar ella 2,2 prosent, og fríggjadagin kostaði norðsjóvarolja, sum skal latast í mars, 118,90 dollarar á oljumarknaðinum í London. Príshækkingin kemur oljufeløgunum væl við. Aftenposten skrivar, at fyri hvønn dollara, oljan dýrkar, veksur ársinntøkan hjá Statoil umleið eina milliard krónur. Í fjør var inntøkan hjá felagnum av olju- og gasssøluni 723 milliardir krónur. Góð tøl og ivi trýsta prísin Fleiri lyklatøl, sum vórðu løgd fram í síðstu viku, benda á, at vøksturin í heimsbúskapinum er heldur størri enn mett, og tað hevur væntandi við sær, at oljuprísurin fer eisini at hækka frameftir. Eitt nú vístu lyklatølini, at Kina innflytir støðugt meiri og meiri olju, at kinesiski útflutningurin í januar í ár var heili 25 prosent størri enn í januar í fjør, at hallið á amerikanska handilsjavnanum var minni í desember, enn greinarar høvdu væntað, og at avlopið í týska uttanríkishandlinum í fjør var tað størsta í meiri enn 60 ár. Men tað eru ikki bara góð lyklatøl, sum trýsta oljuprísin uppeftir. Tað gera ótti og ivi eisini, og her nevna greinarar vandan fyri nýggjum yvirgangsatsóknum at oljuútbúnaði eins og í Algeria, størri spenning orsakað av kjarnorkuverkætlanini hjá Iran, veksandi ófrið í Miðeystri, her ikki minst støðan í Sýrialandi og størri spenning millum Kina og Japan um nakrar oyggjar, sum tey bæði londini kanna sær.